# Suðuroyingar bíðað í tvey ár eftir svari úr landsstýrinum

**Tað eru nú tvey ár síðani, at semja var um at fara undir eina stórfingna menningarætlan fyri Suðuroy. Men enn er ætlanin ongan veg komin og nú eru útlit fyri, at hon verður seinkað enn meir**

VAKSTRARAVTALA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað var ein fagnaðardagur í Suðuroy í mars mánaði fyri tveimum árum síðani.

Tá varð semja gjørd ímillum kommunurnar í Suðuroy og landsstýrið um at fara undir eina miðvísa menningarætlan fyri at fáa menna vinnulívið í Suðuroy.

Men síðani er at kalla onki hent aftur. Ætlanin er seinkað ferð eftir ferð. Og nú bendir nógv á, at hon verður seinkað enn meiri, kanska eitt heilt ár afturat.

Fyri at tryggjað, at ikki alt fánaði burtur aftur, var ætlanin at gera eina vakstraravtalu fyri Suðuroy, har bæði kommunurnar og landsstýrið frammanundan bundu seg til at seta avtaluna í verk.



*Fyri tveimum árum síðani samdust landsstýrið og kommunurnar í Suðuroy um at gera eina vakstraravtalu fyri at menna vinnulívið í Suðuroy. Men síðani hevur drál, miskiljingar og vánaligt samskifti ført til, at næstan onki er hent*

Ætlanin var í fyrstu atløgu at seta 500.000 krónur av til at kanna eftir, hvørji vinnulig øki tað var best hóskandi hjá suðuroyingum at leggja seg eftir.

Av hesari upphæddini skuldi kommunurnar í Suðuroy og landsstýrið betala hvør sína helvt.

Samstundis vóru Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur og Magni Laksafoss, búskaparfrøðingur, bidnir um at gera hesar kanningarnar og útgreina, hvørji vinnulig øki, tað var hóskandi at leggja dent á at menna í Suðuroy.

## Ongan veg komin

Men hóast hetta nú eru tvey ár síðani, má ásannast, at enn er hendan ætlanin at kalla ongan veg komin.

Fyrst gekk ógvuliga strilti at fáa Landsstýrið at játta sína helvt av teimum 250.000 krónunum og tað var ikki fyrrenn málið kom í Løgtingið í fjør, at tað varð samtykt.

Síðani var ein fundur umborð á Smyrli í oktober í fjør ímillum landsstýrið og kommunurnar í Suðuroy um ætlanina.

Har var niðurstøðan, at kommunurnar í Suðuroy skuldu játta 10 milliónir tey næstu fimm árini til at seta eina slíka vinnuliga vakstraravtalu fyri Suðuroy í verk treytað av at Løgtingið eisini játtaði 40 milliónir tey næstu fimm árini.

Niðurstøðan var, at tað var ongin nytta at gera alt tað fyrireikandi arbeiði, fekst ikki samstundis figging til at seta ætlaninar í verk. Sostatt vildu teir báðir serfrøðingarnir ikki fara undir kanningararbeiði, fyrrenn vissa fekst fyri at landið og kommunurnar eisini vóru sinnað at fíggja tað, sum ein slík vakstraravtala kostaði at seta í verk.

Men síðani kom aftur stíg-ur í málið og nú er vandi fyri, at ætlanin verður útsett eitt heilt ár afturat.

## Mugu fáa boð nú

Teir báðir serfrøðingarnir, sum skulu standa fyri arbeiðnum, hava gjørt greitt fyri bæði landsstýrinum og kommunum, at skulu teir fara undir arbeiðið í ár, er tað neyðugt at fáa boð um tað í seinasta lagi nú.

Teir vísa á, at eftir seinastu tíðarætlanini, var ætlanini at fara til verka í vár. Teir gera eisini greitt, at fyri at leggja virksemið hjá teimum tað næsta árið til rættis, mugu teir fáa at vita longu nú í februar um ætlanin skal setast í verk, ella ikki.

Teir vísa á, at fyri at gera hesa ætlanina, mugu teir gera seg leysar av øðrum uppgávum. Tað sama ger seg galdandi fyri Granskingardepilin Fyri Økismenning, sum fær ein týðandi leiklut í arbeiðnum.

Samstundis skulu teir gera avtalur við teir útlendsku partar, sum samstarvast skal við og tað er eisini neyðugt at gera nú.

Sostatt liggur bólturin hjá landsstýrinum og kommununum. Men nær bólturin verður spældur er ikkig greitt enn. Tì sum tað sæst á aðrari grein, sita báðir partar og bíða eftir, at hin parturin skal geva bóltin upp. Og úrslitið er, at alt hevur ligið stilt.

Men sum støðan er nú, bendir nógv á, at eisini hendan tíðarætlanin fær eitt álvarsligt skot fyri bógvin.

# Hava bíðað eftir hvørjum øðrum í eitt heilt ár

**Landsstýrið sigur, at tað hevur bíðað eftir kommununum í Suðuroy. Kommunurnar í Suðuroy siga, at tær hava bíðað eftir landsstýrinum. Ùrslitið er, at onki er hent**

VAKSTRARAVTALA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Landsstýrið sigur, at tað hevur bíðað eftir kommununum í Suðuroy.

Kommunur í Suðuroy siga, at tær hava bíðað eftir landsstýrinum.

Tað er orsøkin til, at tað higartil onki er komið burtur ætlanini at gera eina vinnuliga vakstraravtalu fyri Suðuroy.

Sostatt sær út til, at tað eru misskiljingar ella í øllum førum vánaligt samskifti, sum eru orsøkin til, at alt arbeiðið viðvíkjandi eini vinnuligari vakstraravtalu fyri Suðuroy, hevur ligið í dvala.



*Jacob Vestergaard sigur at hann bíðar eftir suðuroyingum og suðuroyingar siga, at teir bíða eftir Jacob Vestergaard. Nú verður enn ein roynd gjørd at fáa gongd á vakstraravtaluna fyri Suðuroy, sum bíðað hevur verið eftir í tvey ár*

## Skulu binda seg

Í oktober í fjør var ein fundur ímillum kommunurnar í Suðuroy og landsstýrismannin í innlendismálum um ætlanina.

Har varð niðurstøðan, at landið skuldi játta 40 milliónir tey næstu fimm árini og kommunurnar í Suðuroy 10 milliónir fyri at tryggja, at ætlanin ikki fánar burtur, men veruliga verður sett í verk.

Á sama fundi skrivaðu allir borgarstjórarnir í Suðuroy undir eitt viljunarskriv, har teir bundu seg til at játta upphæddina upp á 10 milliónir tey næstu 10 árini, treytað av, at landsstýrið eisini letur sín part.

Annars eru 500.000 krónur játtaðar til at gera tað fyrireikandi arbeiðið fyri at vita, hvørji vinnulig øki tað kundi verið hóskandi hjá suðuroyingum at lagt dent á.

Men niðurstøðan hevur verið, at tað er ongin orsøk at fara undir hesar kanningar, fæst ikki vissa fyri, at fígging fæst til at seta tær í verk og tí var neyðugt at fáa bindandi tilsøgn um 50 milliónir.

## Fleiri misklijingar

Eftir fundin umborð á Smyrli, segði Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í vinnumálum, fyri Sosialinum, at hann skuldi leggja eitt upprit um málið fyri landsstýrið.

Men tað er ikki hent enn. Vit hava tí spurt landsstýrismannin, hvussu tað ber til.

Jacob Vestergaard ásannar, at samskiftið ímillum partarnir hevur ikki verið nóg gott, tí hann hevur bíðað eftir suðuroyingum, samstundis sum suðuroyingar hava bíðað eftir honum.

Hann sigur, at upprunaliga hevði hann fingið tað fatan, at tað fyrireikandi arbeiðið skuldi gerast fyrst fyri at vita, hvørji vinnulig øki tað var hóskandi hjá suðuroyingum at leggja dent á.

Hann heldur, at hevði hann fingið nakað heilt ítøkiligt at hildið fast um, hevði tað verið lættari at fingið undirtøku fyri tí í samgonguni.

Men á fundinum umborð á Smyrli í oktober í fjør skilti hann, at kommunurnar vildu hava trygd fyri, at játtan fekst til at seta ætlanina í verk.

Men aftur her er misskiljing komin í.

- Eg havi bíðað eftir eini formligari fráboðan frá kommununum í Suðuroy um, at tær hava samtykt at játta sín part av fíggingini.

Hann sigur, at hann vildi hava váttan frá kommununum, áðrenn hann legði málið fyri landsstýrið at vita um undirtøka er fyri tí.

- Tað helt eg vera neyðugt fyri at fáa vissu fyri, at hald er ætlanini at fara undir hesa vakstrarætlanina og kommunurnar veruliga standa aftanfyri ætlanina.

Var tað ikki nóg góð trygd, at allir borgarstjórarnir í oynni skrivaðu undir eitt viljunarskriv, har teir váttaðu at játta pengarnar?

- Jú, tað kunnu vit vænta og tí skuldi tað ikki verið annað enn eitt avgreiðslumál at fingið eina formliga fráboðan um, at bý- og bygdaráðini hava samtykt tað.

Tað heldur hann er tann rætta mannagongdin. Men eina slíka fráboðan hevur hann ikki fingið frá kommununum enn.

- Tá ið hendan fráboðanin er komin, fer hann at leggja málið fyri landsstýrið.

Hinvegin halda kommunurnar í Suðuroy, at tá ið allir borgarstjórarnir hava undirskrivað eitt viljunarskriv um at játta 10 milliónir, varð hildið, at tað var nóg góð trygd hjá landsstýrinum.

Jacob Vestergaard vísir á, at útgangsstøðið er, at kommunurnar skuldu betala 10 milliónir og landsstýrið skuldu betala 40 milliónir.

Men tað kann eisini koma upp á tal, at samráðast við kommunurnar um eitt øðrvísi býtið, sigur landsstýrismaðurin.

## Arbeiða víðari

Eli Frederiksen, sum umboðar kommunurnar í Suðuroy í hesum máli, harmast um, at málið er komið í drag.

Men hann sigur, at ætlanin er ikki at sleppa ætlanini og at hann tískil nú hevur biðið allar kommunurnar formliga at samtykkja, at tær eru sinnaðar at játta sín part.

Tá ið tað er avgreitt fær landsstýrið eina formliga fráboðan frá kommununum. Og hann væntar, at tað verður skjótt avgreitt.